# Alt peikar niðureftir á Føroyabanka

*Minni er til av toski, minni er til av hýsu og upsin er munandi minkaður. Eisini er fiskurin meira rak nú enn fyri einum ári síðani.*

Hetta er høvuðsboðskapurin í úrslitinum frá seinastu yvirlitstrolingini, sum Magnus Heinason gjørdi á Føroyabanka í døgunum 7. til 12. september í ár. Tilsamans var trolað á 28 ymiskum støðum á bankanum. Tá hugt verður at miðalveiðuni, vísa úrslitini, at veiðan av toski er minkað við 19 %, hýsuveiðan er minkað við 45 %, og veiðan av upsa er einans 24 % av tí hon var fyri einum ári síðani.

**Fiskurin rakari**
Eisini vísa kanningarnar, at fiskurin hevur minni at eta, og er tí rakari. Tá fiskifrøðingar gera upp hvussu feitur fiskurin er, nýta teir hugtakið "konditiónsfaktor". Hetta er lutfallið millum vekt og longd á fiskinum. Hægri talið er, feitari er fiskurin. Eisini hesi tølini peika niðureftir fyri Føroyabanka. Kanningin vísti, at toskurin er 2,9% klænri nú enn fyri einum ári síðani. Hjá hýsuni er minkingin 6%, meðan upsin er vorðin 10% klænri, samanborið við kanningarnar á heysti 2004.




*Miðalveiðan av toski, sum Magnus Heinason fekk á yvirlitstrolingini á Føroyabanka í september í ár, var einans 45 kg fyri hvønn fiskitíma. Hetta er 19 % lægri enn í fjør og einans 18 % av veiðuni í 2002, tá miðalveiðan var 249 kg fyri hvønn fiskitíma.*




*Konditiónsfaktorurin sigur okkum, hvussu feitur fiskurin er. Hægri hetta talið er, feitari er fiskurin. Í september mánað var konditiónsfaktorurin á føroyabankatoskinum 1,0. Hetta er eru 2,9% lægri enn somu tíð í fjør, tá konditiónsfaktorurin var 1,03. Føroyabankatoskurin er sostatt verri fyri nú enn somu tíð í fjør.*

Les alla frágreiðingina
[LINK http://www.nvd.fo/uploads/tx_userpubrep/NVDrit2005_09.pdf ]
]